

MYNDIR: JENS KRISTIAN VANG OG ÁLVUR HARALDSEN

# Yvir 400 føroyskar kvinnur hava verið hjá Kim

**Vakurleikaserfrøðingurin Kim Novaa hevur, síðani hann byrjaði sítt virksemi í Føroyum, havt um 400-500 føroyskar kvinnur um hendi.**

Hann er serfrøðingur innan fyllingarevnini restylane og botox.
– Tær yngstu, sum koma til mín eru tær, ið á 18-ára degnum hava fingið størri varrar í føðingardagsgávu. Tað sigur Kim Novaa tá vit hittast inni á vakurleikastovuni Cosmeto í Havn.

Hann hevur sjálvur eina klinikk í Keypmannahavn, men síðani 2005 er hann regluliga komin til Føroya at gera restylane, botox og permanent make-up viðgerðir.

– Fyrr var tað mest fyllingarevni restylane, ið føroyskar kvinnur vildu hava, men nú vilja tær flestu hava botox, sigur hann.

2009 vaks nýtslan av botox við 450 prosentum og tann av restylane við 46 prosentum.



*Kim Novaa, vakurleikaserfrøðingur*

Kim Novaa sigur, at hann og nógv onnur, ið starvast innan vakurleikaídnaðin, hava merkt stóran vøkstur, nú fíggjarkreppan ger um seg.

– Fólk eru bangin fyri at missa arbeiði og vilja tí ikki síggja móð og gomul út, sigur hann.

Kundarnir hjá Kim eru mest kvinnur í aldrunum 18-86 ár. 18 ár er aldursmarkið fyri at gera slíkar vakurleikaviðgerðir.

– Tað hendir, at 19 ára gamlar koma inn og vilja fáa botox í pannuna, sigur Kim.

### Hevur tú sjálvur gjørt nakað?

– Ja, eg havi restylane í kjálkunum, varrunum og í linjunum frá nøsini oman til munnin. Botox havi eg í pannuni og millum eyguni.

## Fakta:

**RESTYLANE**

Restylane er hyaluronsyra, ið vit natúrliga hava í kroppinum. Hon verður sprænd inn í leðurhúðina í ávísum dýpi undir rukkunum til at javna ella gera tær grynri. Restylane verður eisini nýtt fyri at gera varrarnar størri ella meira markeraðar.
Ein restylane viðgerð heldur í umleið eitt ár.
Kostnaðurin fyri viðgerðina er úr 2.000-3.000 krónum.

**BOTOX**

Botox er upprunaliga eitt nervagift, ið áður var brúkt til spastikarar og fólk við sveittatrupulleikum. Nú verða ógvuliga lítlar mongdir nýttar at spræna inn í andlitsvøddarnar. Tað steingir fyri nervaimpulsinum til vøddan og ger at hann gevst at draga seg saman – við øðrum orðum lammar man vøddan. Úrslitið er, at rukkurnar oman á vøddanum gerast slættari. Ein botox viðgerð heldur í umleið 3-6 mánaðir. Kostnaðurin er úr 1.500 krónum.

**Kitty May**

*Áðrenn og aftaná viðgerðina*




